# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Hátíðarhald í Gamla Bókhandli

MÓTTØKA

*Myndir: Jens Kristian Vang*



*Vagn Andersen saman við Mariann O. Johansen, sum júst nú er liðug við sína útbúgving sum bókhaldari í handlinum*

Hjá stjóranum í H.N. Jacobsens Bókahandli í Havn, Vagn Andersen, byrjaði hósdagurin 13. september sum ein vanligur arbeiðsdagur. Men áðrenn hann visti av, var hann miðdepulin í einum hátíðarhaldi, sum starvsfólkini saman við nevndini høvdu skipað fyri í sambandi við at í apríl vóru 35 ár liðin síðan hann byrjaði í handlinum, og í summar fylti hann 60 ár.

Vagn er dani, ættaður úr Næstved og útbúgvin bókahandlari. Meðan hann arbeiddi í Danmark, sá hann í einum fakbladi at H.N. Jacobsens Bókahandil í Havn søkti eftir útbúnum starvsfólki til handilin. Hann helt at hetta var ein spennandi avbjóðing, søkti starvið og fekk tað. Carl Niclasen var leiðari í handlinum tá. Ætlanin var bert at royna hetta í eitt ár, men hann giftist, fekk familju og búsettist í Havn. Síðan 1991 hevur Vagn verið stjóri í H.N. Jacobsens Bókahandli.

## Gamal handil

Við sínum 142 árum á baki er H.N. Jacobsens Bókahandil er ein tann elsti handil í landinum. Søgan hjá bókahandilin byrjar, tá Hans Niklái Jacobsen læt upp ein bókahandil í Gongini ólavsøkudag 1865, har hann búði og hevði bókbindarí.

Í 1918 varð gamli Realskúlin á Vaglinum keyptur, og hevur bókahandilin verið har síðani tá. Umframt bókahandilin hevur ein prentsmiðja verið í húsinum til fyri umleið tveimum árum síðan, tá hon varð niðurløgd.

H.N. Jacobsens Bókahandil verður í dag rikin av einum grunni, sum eigur og rekur handilin. Í nevndini sita Tummas Hanus Dam, Malan Marnersdóttir, Heini Joensen, Ólavur Arge og Halgir Winther Poulsen, sum er formaður.

mg



*Tummas Hanus Dam, Halgir Winther Poulsen, Heini Joensen, frá nevndini fyri H.N. Jacobsens Bókahandil og Vagn Andersen stjóri í handlinum*



*Bæði fyrrverandi og núverandi starvsfólk vóru til hugnaløtuna í sambandi við 35 ára starvsdagin hjá Vagn Andersen*



*Hjúnini Katrin og Vagn Andersen*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Margret Halldórsdóttir** vanliga nevnd Magga fer til gravar 22. desember klokkan 13 úr Kapellinum í Hnífsdal

**Dagurin**
**18. desember. Gratianus,** deyður umleið ár 300. Biskupur í Tours í Fraklandi. Varð tikin av døgum, tá ið Diocletianus ráddi.

Lesið Sosialin so eru tit við